# Dimmalætting

– ÁLÍTANDI TÍÐINDI

Fríggjadagur
Nr. 166 • 120. árgangur
5. september 1997
Tlf. 11212 • Fax 10941

kr. 7,00


## Hevur verið í hálva øld í prentarayrkinum



Prentstjórin á Dimmalætting Flemming Samuelsen kann í hesum døgum hátíðarhalda sín fimmti ára starvsdag. Hann hevur verið við í allari menningini, sum verið hevur á tekniska økinum síðan 1947.

Heimatíðindi 4

## Varligt bjartskygni hómast í Vági



Hesi seinastu árini hevur Vágs bygd verið merkt av afturgongd á mongum økjum. Nú benda bæði økta skattainntøkan og vaksandi íbúgvaratalið á eitt varligt bjartskygni.

Heimatíðindi 3

## – Vit vilja ikki longur lata okkum traðka á



– Vit eiga at boða donum frá, at vit ikki longur vilja lata okkum traðka á og draga eftir hárinum, skrivar Sámal P. í Grund, landsstýrismaður, í sambandi við bankamálið. Hann heldur danir halda okkum fyri tann turra spott.

Orðaskifti 12



Frískur vindur upp í strúk í vindi av útnyrðinginorði. Skyggjað og av og á regn ella ælingur. Hitin upp í 13 stig.



## Bindiklubbar úr Vestmanna útferð í Gøtu

Nú bindiklubbaárið so smátt fer at byrja, vóru omanfyri 100 bindiklubbakonur úr Vestmanna og vitjaðu á Tøting í Gøtu seinasta mikukvøld.

Tá Sámal Bláhamar fyrireikaði túrin hevði hann vónað, at einar 50 konur fóru at vísa hesum tilboði áhuga. Men neyðugt var við trimum bussum úr Vestmanna.

Arbeitt verður nú við fleiri tilboðum til teir hundraðtals bindiklubbarnar, sum finnast í Føroyum. Eitt av hesum tilboðum er ein stevna í Norðurlandahúsinum komandi vár.

Heimatíðindi, síða 3

# Festi fram um býarlív



– Her í Syðradali er alt nærri við. Ein skal búgva her fyri at uppliva, hvussu nær náttúran er. Men eisini vit fýra eru nærri at hvørjum øðrum, sigur Anni Lützen.

Fyri einum góðum ári síðani gjørdist hon bóndakona í Syðradali. Saman við manninum Thorvaldi og synunum Sigtór og Oyvindi flutti hon úr Havn til garðin, sum maðurin festi.

Í nógv ár hevur Thorvald Lützen ligið framvið at fáa eitt festi.

– Men fyrr var alt jú arvur, so tað var lítil møguleiki hjá mær, sigur hann. Tá hann fekk møguleikan, leyp hann til og segði arbeiðið sum aktingarmaður hjá býráðnum í Havn frá sær. Í dag hevur hann 25 mjólkineyt, 160 áseyðir, ross, kaninir, dunnur og gæs at taka sær av.

Tey bæði kenna seg sera heppin – tey fingu avbjóðingina við festinum, men nýtast ikki at sakna býarlívið, sum bert er fjúrtan kilometrar í ein landsynning..

– Vit hava øll áhuga fyri hesum – men tá vit fara til Havnar, njóta vit tað ordiliga, sigur Anni Lützen.

Heimatíðindi, síða 4

## Í minsta lagi tvey flogfør til Spania

Tað gongur sera væl hjá Atlantic Airways at selja flogferðaseðlar til Spania-túrin í sambandi við landsdystin hjá føroyingum.

Báðir túrarnir hjá Atlantic Airways til Spania 7. og 8. oktober í sambandi við landsdystin er fullsettir.

– Sølan av flogferðaseðlum hevur gingið sum heitt breyð, sigur Heri Niclasen, marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways.

Í løtuni verða bíleggingar til Spania-túrin settar á bíðilista. Sagt verður frá Atlantic Airways, at tey vilja hava eitt sindur meira enn fulla flúgvara á bíðilista, áðrenn tey seta eitt triðja flogfar inn.

Eisini hevur verið lýst við Noregsferð á jólum, og har er flúgvarin heim úr Bergen tann 18. desember longu hálvsettur. Í fjør var útselt á túrinum heim úr Bergen nærum beinanveg.

– Einans 25 fóru úr Føroyum til Bergen í fjør, so har verður óivða eisini gott pláss hesaferð. Tað tykist sum um føroyingar heldur vilja halda jól í Føroyum enn í Noregi, sigur Heri Niclasen.

D

# Drúgv oljufyrireiking kostað milliónir í mistum skatti

Fyri trimum árum síðan byrjaðu kanningarnar um olja var í føroysku undirgrundini. Og longu eru nógvar milliónir krónur mistar í skatti, tí føroyska skattalóggávan ikki røkkur eftir pengunum, sum kanningarfeløgini vanliga leggja til síðis til skatt í vertslandinum.

Georg L. Petersen

Fimm seismisk kanningarskip lógu í føroyskum øki samstundis eitt tíðarskeið í summar.

Vóru tey bretsk, slapp manningin undan at gjalda skatt í heimlandinum. Hetta er ein bretsk regla sum er gjørd, tí manningin vanliga rindar skatt til tað landið, har kanningarnar verða gjørdar.

Men Føroyar eiga onga lóg, sum kann fáa hendur á hesum pengum, so bretska manningin hevði lív og góðar dagar vegna vantandi føroyska lóggávu.

Tað er heilt vanligt, at skattaøkið verður víðkað til eisini at umfata virksemi á sokklinum, tá oljukanningar ella leitingar fara fram. Tá verður manningin skattað og inntøkan av virkseminum somuleiðis.

Í t.d. Danmark hevði hvør av manningini rindað 35% í skatti til danska statskassan.

Í meðal eru 80 mans knýttir at hvørjum seismikkskipi, sum arbeiða í tveimum vaktum, og tjena í meðal 25.000 krónur um mánaðin. Í føroyskum sjógvi vóru minst fimm skip í tríggjar mánaðir, og verður danska skattaprosentið brúkt, so høvdu 10,5 milliónir krónur endað í føroyska landskassanum. Hetta er bara í ár – tílíkt virksemi hevur verið í føroyskum øki í trý fylgjandi summur.

Landið, har skattgjaldarin er heimahoyrandi, má bara finna seg í, at annað land fer avstað við einum parti av skattainntøkunum.

Men ikki ein klovin skattakróna er endað í tí føroyska landskassanum.

Orsøkin til, at eingin serliga skattalóg er á kolvetnisøkinum er, at skattabólkurin hjá oljuráðleggingarnevndini enn ikki er komin við nøkrum uppskoti. Alt verður tikið undir einum, og roynt verður at fáa uppskotið klárt, tá sjálvar oljuleitingarnar byrja – men tá eru longu trý ár við seismiskum kanningararbeiði farin aftur um bak.

Føroysku skattamyndugleikarnir eru ikki rættiliga slopnir upp í part, vegna eina landsstýrissamtykt frá 22. apríl 1994. Henda samtykt letur upp í hendurnar á Oljuráðleggingarnevndini m.a. at gera uppskot um skattareglur. Tað vil siga, at Toll- og Skattstovan og landsstýrismaðurin við fíggjarmálum ikki kundu gera nakað.

– Innleiðandi kanningarparturin hevur ikki verið prioriteraður frammalaga. Vit kundu sett reglur longu tá kanningararbeiðið byrjaði og so reglur tá leitingararbeiðið skuldi bjóðast út seinni, sigur Annfinn Kallsberg, landsstýrismaður.


Málingahandilin í Svabosgøtu 35 ár

Í sambandi við 35 ára føðingardagin
hava vit drúgvan leygardag tann 5. september 1997.
Opið er til kl. 17.00.
Sí tilboðini inni í blaðnum og í S.V.F. í dag

